# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Ingi Suni Jacobsen:

## Málningaframsýning í Mentamálráðnum

**Mikudagin 7. september 2005 letur Ingi Suni Jacobsen í Havn upp eina málningaframsýning í Mentamálaráðnum. Fernisering verður frá kl. 15-17, tá listamaðurin og bassspælarin Øssur Johannesen fer at spæla**

**Tíðindaskriv**



Ingi Suni Jacobsen letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum mikudagin 7. september 2005, kl. 15.00-17.00. Framsýningin er opin mánadag til hósdag kl. 08.00-16.00, fríggjadag kl. 08.00 - 15.00.

Ingi Suni Jacobsen (f. 22. august 1976) er føddur og uppvaksin í Klaksvík, men er búsitandi í Tórshavn. Hann hevur málað í 5 ár, og fær hann íblástur ymsastaðni frá, t.d. frá írska tónleikabólkinum U2 og amerikansku Portishead. Umframt hetta fær hann eisini nógvan íblástur frá listarmonnunum Van Gogh og Salvadore Dali. Ingi Suni Jacobsen hevur ætlanir at fara uttanlands at útbúgva seg innan list.

Stílurin hjá Inga Suna Jacobsen er abstraktur og til tíðir surrealistisktur, men sum heild málar hann mest abstrakta list. Litirnir eru sum oftast litríkir, t.v.s. bláir, reyðir og gulir.

Ingi Suni Jacobsen hevur luttikið á ymiskum framsýningum og var hann t.d. við á Ólavsøkuframsýningini í ár. Tá framsýningin letur upp verður tónleikur at hoyra av Øssuri Johannesen listamanni og bass-spælara. Framsýningin verður til 31. desember 2005, og eru øll vælkomin.




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í sambandi við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo


# Ráðgeva og stuðla fólki við krabbameini

**Føroya Felag móti Krabbameini hevur sett Mariu Debess í starv á skrivstovu felagsins sum ráðgeva hjá felagnum**

FELØG

Maria Debess, sum er 40 ára gomul, er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur onkologiska eftirútbúgving.

Hon hevur starvast á medisinsku deildunum á Landssjúkrahúsinum, B6 og B7, og somuleiðis á onkologiska ambulatoriinum á Ríkissjúkrahúsinum. Síðan 1999 hevur hon starvast á onkologiska ambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum og tað fer hon framhaldandi at gera hálva tíð.

Á skrivstovuni hjá Krabbameinsfelagnum fer Maria at taka sær av at ráðgeva krabbameinssjúklingum og avvarðandi teirra, eins og at taka sær av øðrum uppgávum saman við Jansy Gaardlykke, sum síðan 1996 hevur starvast í felagnum sum ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur.

Virksemið í felagnum, sum telist millum størstu sjúklingafeløg í Føroyum, er økt nógv seinnu árini.

Felagið skipar javnan fyri skeiðum, ráðstevnum, fyrilestrum og undirvísing, og tað tekur eisini lut í nógvum fundarvirksemi, bæði í Føroyum og uttanlands. Virksemið í sjálvhjálparbólkunum í felagnum er somuleiðis stórt.

**sb.**



*Jancy Gaardlykke (hm.) hevur nú fingið ein starvsfelaga í arbeiðinum við at ráðgeva og kunna um krabbamein – Maria Debess (vm.)*

*Mynd :Jens Kr. Vang*